TALGILDU FØROYAR

01100110 01101111

AKSTOVAN

# Projektkommissorium

## Talgilt Koyrikort, Forkanning

27-05-2021

# 1 Endamál

| Stamdata | |
|---|---|
| Projektnavn: | *Talgilt Koyrikort, Forkanning* |
| Leiðari av verkætlan: | *Jens Petur Andreasen* |
| Stutt Lýsing: | *Forkanningin um Talgilt Koyrikort skal eftir ætlan verða avgerðargrundarlag fyri at halda áfram við menningini av einara møguligari framtíðar loysn fyri talgilt koyrikort í Føroyum. Forkanningin skal veita neyðugu upplýsingarnar, og greiningina, soleiðis at grundarlag er fyri at taka avgerð um eina framtíðar loysn. Forkanningin skal samstundis verða forarbeiðið fyri einari framtíðar menningar-verkætlan, soleiðis at lættari verður at koma ígongd.* |
| Stovna (dato): | *25-05-2021* |

# 2 Bakgrund og motivatión fyri forkanning

Tøknin hevur flutt seg nógv tey seinastu árini, og hevur hetta ført við sær eitt rák, har alsamt fleiri viðurskifti verða avgreidd á snildfonum. Hetta er eisini galdandi fyri koyrikort, sum í fleiri av grannalondum okkara nú eru talgildað og eru at finna sum appir á telefonum. Akstovan, ið hevur samband við myndugleikar í hesum londum, sær nógvar møguleikar við at talgilda føroyska koyrikortið, og metur at vit eru búgvin til at fara undir arbeiðið við at talgilda koyrikortið í Føroyum.

Eftir øllum at døma fara alsamt fleiri lond at talgilda koyrikortini í framtíðini, og er hetta eisini í tráð við rákið, ið sæst innan samfelagsliga talgilding á øðrum økjum. Tí er tað neyðugt at íverkseta hetta arbeiðið stundisliga, um vit ikki skulu gerast eftirbátar á hesum økinum.

Talgildu Føroyar hevur, við sínum loysnum, skapt nakrar karmar, ið gera eina slíka loysn lættari at íverskseta í Føroyum. Harafturat hevur Talgildu Føroyar seinastu árini tilogna sær nógvar royndir innan slíkar KT verkætlanir. Akstovan bar sostatt fram ynski til Talgildu Føroyar um at hjálpa við at gera eina forkanning til eitt talgilt koyrikort.

# 3 Grundarlag fyri stigtøku

| Projektdáta |
|---|
| **Stigtakari til projektið:**<br>Akstovan er stigtakari til forkanningina. |
| **Lýsing av projektinum/tørvinum:**<br>Sum nevnt áður, so er eitt rák har vit síggja, at fleiri av londunum rundanum okkum hava fingið talgilt koyrikort. Um vit ikki skulu gerast eftirbátar á hesum økinum, so er neyðugt at vit gera okkum nakrar tankar um hvussu eitt møguligt talgilt koyrikort skal íverksetast í Føroyum.<br><br>Helst eru fleiri borgarar, ið hava upplivað, at tey ikki hava koyrikortið uppi á sær tá tey hava havt tørv á hesum. Telefonina hava tey flestu altíð uppi á sær, og sostatt slepst undan, at koyrikortið liggur eftir við hús. Við einum talgildum koyrikorti hevur tú altíð koyrikortið við hondina tá tørvur á hesum. Harafturat er ein ávísur politiskur áhugi fyri loysnini. |

Eisini er hugsandi, at eitt talgilt koyrikort kundi verið brúkt sum samleikaprógv, har vit annars eru von at brúka tað fysiska koyrikortið.

Áðrenn farast kann víðari við menningini av talgildum koyrikorti í Føroyum, er neyðugt við einari forkanning, ið kann lýsa møguligar loysnir, og veita neyðugu upplýsingarnar, ið kunnu verða við til at tryggja politiska undirtøku.

Forkanningin skal lýsa ymisk viðurskiftir, ið eru knýtt at einari eventuellari menningar-verkætlan av talgilda koyrikortinum. M.a. skal ein tørvslýsing gerast, fyri at nágreiniliga lýsa hvønn tørv ein slík loysn skal nøkta. Teir ymisku lutirnir av forkanningini eru nærri lýstir undir punktunum "Endamál" og "Veitingar".

**Endamál við verkætlanini:**
Endamálið við forkanningini er at skapa eitt avgerðargrundarlag, ið skal liggja til grundarlag fyri avgerðini um víðarimenningini av talgildum koyrikorti í Føroyum. Tað er m.a. at greina og skjóta upp møguligar loysnir, og at veita neyðugu upplýsingarnar soleiðis, at tað verður lættari at takað avgerð um eina framtíðarloysn. Forkanningin skal samstundis verða forarbeiði til eina møguliga menningar-verkætlan, soleiðis at íverksetanin verður lættari. Harafturat hevur forkanningin til endamáls at tryggja politiska undirtøku fyri víðarimenningini av talgildum koyrikorti í Føroyum.

**Vavið:**
Forkanningin fevnir m.a. um greining av øðrum loysnum, greining av neyðugum lógarbroytingum, uppskot til møguligar loysnir og tí sum har hoyrur til. Harafturat skal ein kostnaðar- og tíðarmeting gerast.

Nærri lýsing av vavinum, sæst í punktinum "Veitingar" niðanfyri.

**Avmarkingar:**
Forkanningin fevnir ikki um eina neyva kravfesting ella menning av loysnunum ella fremjing av neyðugum lógarbroytingum.

**Veitingar:**

**1. Greining av loysnum úr øðrum londum:**
Fyrsta veitingin er ein greining av loysnunum, ið longu eru at finna í norðanlondum. Sum nevnt áður, so hava fleiri norðanlond longu fingið talgilt koyrikort. Ætlanin er, at vit seta okkum í samband við avarðandi myndugleikar, og seta upp fund har vit kunnu fáa demo av loysnunum og samstundis fáa høvi at spyrja viðkomandi spurningar. Úrslitið av hesum arbeiðinum verður ein greining av øllum loysninum, ið loyvir okkum at samanbera funktionalitetir og tekniskar loysnir, og gevur okkum harvið grundarlag fyri at meta um okkara egnu loysn.

**2. Áhugapartagreining**
Gerast skal ein greining av møguligum áhugapørtum. Vit vita, at í Danmark hevur løgreglan verið ein samstarvsfelagið í menningini av talgilda koyrikortinum. Fyri at tryggja at framtíðarloysnin verður nøktandi fyri allar partar, ið skulu brúka loysnina, er tað sera umráðandi, at verkætlanin verður framd saman við viðkomandi áhugapørtum. Áhugapartagreiningin skal m.a. lýsa áhugapartarnar og teirra "áhuga" í loysnini.

**3. Tørvslýsing**
Næsta stigið er at gera eina tørvslýsing fyri at lýsa hvønn tørv okkara loysn skal nøkta. T.d. skulu vit meta um koyrikortið einans skal nýtast sum koyrikort, ella um talgilda koyrikorti eisini

skal virka sum alment góðkent samleikaprógv. Hetta hevur sjálvsagt ávirkana lógir, eins og at hetta setur krøv til teknisku loysnina. Harafturat skulu altjóða krøv til talgild koyrikort eisini lýsast.

**4. Greining av neyðugum lógarbroytingum:**
Gerast skal ein útgreining av neyðugum lógarbroytingum. M.a. kann verða neyðugt at broyta lógir, har fysiska koyrikortið verður nevnt, um vit ynskja at talgilda koyrikortið skal hava sama endamál.

**5. Útgreining av trygdarkrøvum:**
Gerast skal ein greining av trygdarkrøvum, ið eru tengd at einari slíkari loysn, og hvørji teknisk tiltøk eru neyðug fyri at liva upp til hesi.

**6. Lýsing av trimum loysnum á konsept stigi**
Gerast skal ein lýsing av 2-3 møguligum loysnum við ymiskum ambitiónsløgum (einfalt, miðal, ambitiøst). Loysnirnar skulu helst gerast soleiðis, at tað er møguligt at koma frá tí einføldu loysnini til ta ambitøsu, um ein velur at leggja seg eftir tí einføldu loysnini fyrst.

Partur av hesari veiting skal veitast áðrenn uppskot til fíggjarlóg fer til viðgerð (miðjan sept.)

**7. Ein yvirskipað ætlan fyri íverkseting, herundir kostnað og tíð**
Eitt av endamálunum við forkanningini er, at tað skal tykast lættari at íverkseta menningina av loysnini. Tískil skal ein yvirskipað ætlan fyri íverkseting gerast. Partur av hesari veitingini er, at gera eina kostnaðar- og tíðarmeting fyri ymisku loysnirnar, ið verða skotnar upp.

**8. Framløga fyri politisku skipanini**
Tann seinasta veitingin er ein framløga fyri politisku skipanini, hvørs endamál er at tryggja politiska undirtøku fyri víðarimenning av talgildum koyrikorti í Føroyum. Hetta er seinasta veitingin, og er verkætlanin at meta sum liðug eftur at hendan er handa.

**Møguligir áhugapartar og málbólkar:**

**Áhugapartar**:

- Akstovan
- Løgreglan.
- Talgildu Føroyar
- Fíggjarmálaráðið
- Stovnar og virkir, ið brúka koyrikort sum samleikaprógv.

**Málbólkur**:

- Borgarar, ið hava koyrikort.

**Mál og succeskriterier:**

**Fyri at verkætlanin skal metast at verða væl eydnað, so er neyðugt at**:

- Forkanningin skapar politiskan áhuga í tann mun at undirtøka verður fyri at halda áfram við menningini.
- Forkanningin er eitt týðandi grundarlag fyri einum møguligum útboði.

- Loysnirnar eru so mikið væl lýstar, at íverksetanin tykist lættari.
- Loysnirnar eru brúkaravinarligar.

# 4 Tíðarnýtsla fyri forkanning

## Uttanhýsis tilfeingi

Niðanfyri sæst ein útgreining av uttanhýsis tilfeinginum:

| | Tíðarnýtsla |
|---|---|
| Uttanhýsis ráðgevar – Verkætlanarleiðari<br><br>**Uppgávur:**<br>- Fyrireiking og facilitering av verkstovum<br>- Samskipan av samstarvinum við áhugapartar<br>- Gerð av greiningarleisti<br>- Luttøka á fundum<br>- Organisering og motivatión av verkætlanarbólkinum<br>- Tryggja, at verkætlanini skríður fram sum ætlað (Til tíðina og innan fyri kostnaðarmetingina)<br>- Handfaring av váðum<br>- At lýsa uppgávuna hjá KT veitaranum<br>- Samskipan av aktivitetum og tilfeingi<br>- Gera rapportir og leggja hesar fram fyri stýrisbólkinum<br>- Gjøgnumganga tilfar fyri at tryggja góðskuna | 190 tímar |
| Uttanhýsis ráðgevar – Lýsing av tekniskum loysnunum<br><br>**Uppgávur:**<br>- At lýsa 2-3 møguligar loysnir<br>- At lýsa tøkniliga arkitekturin<br>- At tryggja, at loysnirnar nøkta ásettu trygdarkrøvini<br>- At meta um vavið á menningaruppgávunum | 160 – 220 tímar |

## Innanhýsis tilfeingi

| Økið | Ressursa | Tíðarnýtsla |
|---|---|---|
| **Fakligt tilfeingi**<br><br>**Uppgávur:**<br>- Luttaka á fundum og verkstovum.<br>- Gera/skriva tilfar. | Tórunn, Brandur, Øssur (AKS) | 2 dagar um vikuna |

| | | |
|---|---|---|
| - Veita fakliga ráðgeving til aðrar partar av forkanningini.<br>- Luttaka í greiningini av øðrum loysnum. | | |
| **Løgfrøðisligt tilfeingi**<br><br>**Uppgávur**:<br>- Veita ráðgeving um lógir.<br>- Gera uppskot til lógarbroytingar. | Annika (FMR)<br>Jákup (AKS)<br>Jósup (TF) | 30 tímar tilsamans |
| **Tøknilig lýsing av internum skipanum**<br><br>**Uppgávur**:<br>- Tryggja at framtíðarloysnin hóskar seg til, og kann knýtast í, núverandi skipanir hjá Akstovuni. | Elias (AKS) | 10 tímar |
| **Tøknilig lýsing av undirstøðukervinum**<br><br>**Uppgávur**:<br>- Tryggja at framtíðarloysnin kann virka á undirstøðukervinum hjá Talgildu Føroyum. | Janus (TF) | 10 tímar |

# 5 Bygnaður

| Leiklutur/bólkur | Navn á luttakara |
|---|---|
| **Eigari av verkætlan:** | Fíggjarmálaráðið |
| **Stýrisbólkur:** | Jákup Jacobsen (Akstovan), formaður og Nicolai Mohr Balle (Talgildu Føroyar) |
| **Leiðari av verkætlan:** | Jens Petur Andreasen (Talgildu Føroyar) |
| **Projektbólkur:** | Jens Petur Andreasen (Talgildu Føroyar) og Tórunn S. Miðberg (Akstovan) |




# 6 Tíðarætlan

Niðanfyri sæst ein yvirskipað tíðarætlan fyri verkætlanina.




# 7 Kompleksitetur

| Øki | Váði |
|---|---|
| **Uppgávan:** | - Ókend loysn. |

| | |
|---|---|
| **Tilgongd:** | - Er eitt samstarv ímillum TF og Aktovuna, so tað er umráðandi at dyrka samstarvið og skipað verkætlanina væl og hava eitt regluligt samskifti millum partarnar. |
| **Umverðin:** | - Mótstøða ímóti talgilding. |
| **Áhugapartar:** | - Ókendir áhugapartar.<br>- Ymisk krøv frá ymiskum áhugapørtum. |
| **Tilfeingi:** | - Manglandi fígging.<br>- Kapping um tilfeingi. |
| **Handfaring av kompleksiteti:** | Váðar verða handfarnir so hvørt sum teir uppstanda. Verkætlanarleiðarin hevur skyldu yvir fyri stýrisbólkininum, at gera vart við váðar, ið uppstanda, og at greiða frá hvussu hesir verða handfarnir. |